# Tjaldursmálverjin fekk tríggjar dystir

**Dejan Lacok skal sita uttanfyri tríggjar dystir, afturfyri at hann varð burturvístur í dystinum hjá Tjaldri móti KÍF fyri viku síðani. Tjaldur heldur lítið høpi vera í avgerðini, men fer kortini ikki at kæra**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Tað var í Hoyvíkshøllini síðsta sunnudag, tá KÍF og Tjaldur hittust, at dómararnir Hannis Wardum og Eyðun Samuelsen valdur at vísa málverjanum hjá Tjaldri burtur.

Hetta er fyrstu ferð í mong harrans ár, at tveir dómarar velja at geva einum spælara harðasta dómin, sum yvirhøvur er í hondbólti.

Sjálv hendingin fór fram í fjórða minutti í seinna hálvleiki, tá Jónálvur Johannesen hjá KÍF leyp inn og skoraði. Hann nakað langt inn móti málinum, og bæði hann og málverjin hjá Tjaldri fóru um koll.

Jónálvur var fyrri uppi og skumpaði so hin, og tað fekk hann eisini útvísing fyri. Men áðrenn dómararnir vóru lidnir við sítt, vildi Dejan Lacok sleppa at hevna seg eisini, og tað kostar honum nú karantenu í tríggjar dystir.

Kappingarnevndin hjá Hondbóltssambandi Føroya tosaði fyrst leysliga saman um málið mánakvøldið, og mikukvøldið varð so endaliga avgerðin um teir tríggjar dystirnar tikin.

## Kæra ikki

Men í Tjaldri eru tey alt annað enn nøgd við, at tey skulu vera jugoslaviska málverjan fyriuttan í tríggjar dystir:

- Nú sá eg ikki sjálvur dystin, men frá óvildigum sjónarváttum havi eg fingið at vita, at munurin á brotsverkunum hjá okkara málverja og kollfirðinginum var ikki so stórur, at tað kann revsast við tveimum minuttum til teirra spælara og trimum heilum dystum til okkara málverja, sigur Ragnar S. Olsen, formaður í Tjaldri.

- Eg skal ikki bera í bøtuflaka fyri eina hevndargerð, tí tað er sjálvandi ongantíð rætt at hevna. Men tá okkara málverji fekk blá merki um allan kroppin, tí hin spælarin var lopin beint inn í hann, dugi eg ikki at skilja, at so stórur munur skal vera á, hvussu stór revsingin er.

Hóast hetta, so fer Tjaldur ikki at kæra avgerðina hjá kappingarnevndini til dómsnevndina, sum annars er ein møguleiki sambært grein 6.16f í kappingarreglunum fyri hondbólt.

- Tað er vónleyst hjá okkum at kæra, tí vit vinna einki við tí. Hetta sigi eg av royndum, tí vit hava longu frammanundan eina heilt aðra kæru liggjandi hjá hondbóltssambandinum, men har kemur bara einki svar, sigur Ragnar S. Olsen.

- Og tá vit skulu noyðast at rykkja hondbóltssambandið eftir svari upp á eina kæru, dugi eg ikki at síggja, at tað skal gera nakran mun, tí tað kann vera, at teir tríggir dystirnir longu eru farnir afturum, áðrenn nakað svar kemur.

## Fleiri ymisk boð

Eitt annað, sum tey í Tjaldri eru ónøgd við í sambandi við hetta málið, er at tað koma ymisk boð úr hondbóltssambandinum.

- Undan steypadystinum á Skála týskvøldið spurdu vit okkum fyri hjá hondbóltssambandinum, og tá fingu vit at vita, at Dejan fekk karantenu í tveir dystir. Men tá vit so skrivliga fingu úrskurðin hjá kappingarnevndini at vita, var karantenan blivin til tríggjar dystir, sigur formaðurin í Tjaldri.

- Tað líkist svartasta ongum, at vit soleiðis fáa ymisk boð. Tann, ið bar okkum boðini fyrru ferðina, legði enntá aftrat, at har vóru vit heppin, at tað bara bleiv talan um tveir dystir. Og so stendur í skrivligu fráboðanini, at karantenan er tríggjar dystir. Eg skilji ikki sovorðnan framferðarhátt.

Hann sigur, at tað er ikki sørt órógvandi fyri arbeiðið í felagnum, at tey skulu fyrihalda seg til tveir ymsar úrskurðir í sama máli, men at tey velja at trúgva, at tað eru skrivligu boðini frá hondbóltssambandinum, sum eru tey endaligu.

- Dejan sat longu uttan fyri steypadystin móti StÍF týskvøldið, men nú hann harumframt skal sita uttan fyri tveir dystir aftrat, merkir tað fyri okkum, at vit skulu klára okkum uttan okkara góða málverja restina av grundspælinum, tí vit bara hava tveir dystir eftir.

Hetta vil við øðrum orðum siga, at Dejan Lacok ikki aftur fer at standa í málinum hjá Tjaldri fyrr enn síðst í januar mánaði, tá endaspælið í landskappingini fer í gongd.



*Nú avgerðin hjá kappingarnevndini er tikin og Dejan Lacok fær karantenu í tríggjar dystir, noyðist besta mansliðið hjá Tjaldri at klára seg uttan jugoslavisska málverjan restina av grundspælinum*

# 2.050 fara undir Vestmannasund

**Renni- og gongukappingini gjøgnum Vágatunnilin í morgin verður nógv tann størsta av sínum slagi, sum nakrantíð hevur verið í Føroyum, og tí er hon nú umskipað til motiónskapping**

KAPPRENNING
*Hilmar Jan Hansen*

Hóast tað ikki verður koyrandi undir Vestmannasundi fyrr enn týsdagin, sleppa rennarar og gongufólk longu í morgin at royna undirsjóartunnilin.

Millum tiltøkini, nú koyrandi verður millum Vágar og meginøkið, er renni- og gongukappingin, sum felagið Bragdið hevur átikið sær at fyriskipa vegna vágafólk, ið annars standa fyri tiltakinum.

- Tá vit byrjaðu at fyrireika okkum til kappingina, sóu vit fyri okkum, at kanska eini 500 til 800 fólk komu við, men nú er talið komið upp á 2.050, og har steðgað vit, sigur Andrea Nielsen, fyriskipari frá Sandavágs Ítróttarfelag.

- Sostatt er kappingin nógvar ferðir størri, enn vit høvdu droymt um, og eg ivist ikki í, at vit høvdu komið upp á 3.000, um øll sluppu við, sum hava spurt seg fyri, eftir at tilmeldingarfreistin var úti, sigur.

## Motiónskapping

Av tí at hetta bæði er gongu- og rennikapping, samstundis sum hetta hjá mongum er fyrsti møguleikin at sleppa undir Vestmannasund, er luttakaratalið so ovurhonds stórt, og tað ger eisini, at so mikið meira er at halda skil á.

- Av tí at fólk kunnu velja, um tey annaðhvørt vilja ganga ella renna, hava vit eisini gjørt av at halda gongu- og rennifólkini frá hvørjum øðrum, so at band verður ímillum, sigur Sølvi R. Hansen frá Bragdinum.

- Upprunaliga skuldi hetta vera ein kapping við tíðtøku og øllum, men av tí at so nógv fólk er við, hava vit broytt ætlan, tí tað setur øgiliga stór krøv til trygdina. So í staðin verður kappingin skipað sum ein rein motiónskapping.

Hetta verður gjørt fyri at leggja dent á, at tiltakið fyrst og fremst snýr seg um at uppliva nakað ókent og at nýta hendan serstaka møguleikan at renna gjøgnum undirsjóartunnilin.

Í staðin fáa allir tilmeldaðu luttakararnir eina t-skjúrtu, og eisini verða vinningar lutaðir burtur millum luttakararnar, so sum flogferð, fartelefon, vikuskifti á hotelli og gávukort til 5-túra kort gjøgnum Vágatunnilin.

Byrjað verður beint innan fyri tunnilsmunnan Leynamegin í morgin klokkan tvey, og málið er beint innan fyri tunnilsmunnan Vágamegin. Vágafólk verða undan kappingini koyrd til Leynar í bussi, og hini verða eftir kappingina koyrd aftur til Leynar.




